almannaverkið

**Kunning um dagpeningaskipanina við óarbeiðsføri vegna sjúku ella skaða**

Dagpeningur er ein fyribils veiting, sum tú kanst søkja, um tú vegna sjúku ella skaðatilburð ikki kanst røkja títt starv, og tí missir arbeiðsinntøku. Dagpeningur kann veitast til m.a. sjómenn, sum hava hýru, ella ætlandi skuldu hava hýru, við føroyskum ella útlendskum fari. Rætturin til dagpening er treytaður av, at tú hevur fastan bústað og fulla skattskyldu í Føroyum. Persónar, sum eru fevndir av Nordisk Konvention om Social Sikring, og eru mynstraðir við føroyskt skrásettum skipi, og hava avmarkaða skattskyldu í Føroyum, skulu tó ikki lúka treytirnar um fastan bústað og fulla skattskyldu.

Fyri at fáa dagpening skalt tú senda Almannaverkinum umsókn um dagpening. Tú hevur rætt til dagpening frá 1. fráverudegi, um Almannaverkið hevur móttikið umsóknina í seinasta lagi 60. dagin eftir 1. fráverudag. Fyri sjómenn, ið verða óarbeiðsførir millum túrarnar, er 1. fráverudagur tann dagurin, har skipið fer avstað aftur. Verður umsóknin móttikin seinni enn 60. dagin eftir 1. fráverudag, kann dagpeningur bert játtast frá móttøkudegnum. Almannaverkið skal somuleiðis hava læknaváttan, ið staðfestir óarbeiðsførið.

Dagpeningaveitingin verður vanliga roknað út frá miðalinntøkuni 5 tær seinastu vikurnar undan fráveruni. Upphæddin er 100% av inntøkuni, tó í mesta lagi 80% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Í løtuni er hægsta dagpeningaveiting kr. 4.412 um vikuna.

Tú kanst í mesta lagi fáa dagpening í 40 vikur frá 1. fráverudegi í einum 12 mánaðarskeiði. Tó kanst tú fáa dagpening í upp til 2 ár, um talan er um arbeiðsskaða. Tað er ein treyt, at málið um arbeiðsskaða er fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum og verður viðgjørt eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Smyrilsvegur 20 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo